## Eingin sigur í eygsjón



Amerikanski generalurin David McKiernan, sum er ovasti fyri altjóða herdeildunum í Afghanistan, sigur við BBC, at sum eru altjóða deildirnar ikki førar fyri at vinna stríðið við Taleban har suðuri í landinum. Generalurin sigur, at har norðuri, har vesturi og partvíst har eysturi í Afghanistan er sigurin í nánd, men at støðan er ein heilt onnur har suðuri og partvíst eisini har eysturi. USA hevur gjørt av at senda fleiri túsund hermenn afturat til Helmand-landspartin har suðuri í Afghanistan, har bretskir og danskir hermenn hava støðir sínar.

## Løgreglumenn drápsmenn

Ákæruvaldið í Brasil hevur ákært níggju løgreglumenn í stórbýnum Sao Paulo fyri at hava verið uppi í einum deyðsliði, sum myrdi minst tólv fólk í býnum í fjør, harav fimm vórðu hálshøgd. Løgreglumenninir vórðu handtiknir, eftir at vitni høvdu sæð teir myrða ein mann. Í oktober gjørdu myndugleikarnir fleiri húsarannsóknir í Sao Paulo, eftir at fleiri fólk vóru funnin deyð, og kanningar vístu, at í fleiri førum var talan um teir somu drápsmenninar. Stutt eftir vórðu teir níggju løgreglumenninir tiknir, og síðani eru fimm tiknir afturat, skrivar AP úr Sao Paulo.

# Nýggjar leiðir innan bindisniðgeving



**Fríggjadagin lat ein framsýning innan bindisniðgeving upp í Norðurlandahúsinum, ið ber heitið DK:KNIT. Nýggju sniðini bróta upp úr nýggjum, og tora at førka seg víðari í menningini innan binding**





SNIÐGEVING
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Tað er Designskolen i Kolding, ið hevur tikið stig til, og hevur húsað framsýningini í Danmark seinastu tveir mánaðirnar, og fram til 14. apríl verður høvi at síggja framsýningina í Norðurlandahúsinum. Luttakandi sniðgevar, ið eru umboðaðir á framsýningini, eru fyrrverandi næmingar á skúlanum, ella hava eitthvørt annað tilknýti til skúlan.

Í Føroyum er stórur áhugi fyri at binda og gera nýggj snið og mynstur úr teimum meira siðbundnu troyggjunum. Men fleiri av teimum lutum, ið verða sýndir fram á hesi framsýningini, fara eitt fet víðari í menningini innan binding, og bróta heilt upp úr nýggjum, bæði í mun til snið og mynstur. Ein hin mest kendi danski sniðgevin innan binding er Iben Høj, og er hon eisini umboðað á framsýningini. Hon hevur starvast hjá altjóða sniðgevum so sum Donna Karan og Marni, og hevur harumframt megnað at selt síni snið til Marc Jacobs og Calvin Klein.

Føroyar eru eisini umboðaðar á framsýningini á ymiskan hátt. Føroyski sniðgevin, Katrina í Geil, hevur útbúgving frá Designskolen i Kolding, og er ein av teimum 11 sniðgevunum, ið eru við á framsýningini. Harafturat hevur ein annar sniðgevi á framsýningini, Dorte Merete Lykke Jensen, føroyska ommu í faðirætt, og sigur seg hava fingið áhuga fyri binding haðani.



*Í Norðurlandahúsinum hongur framsýning við sniðgevum frá Kolding Designskole. Luttakararnir hava ella eru knýttir at skúlanum, og millum teirra er Katrina í Geil, ovast til høgru á síðuni. Á framsýningini eru øðrvísi bindisnið, bæði innan klæðir og innbúgv.*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



